gult cyan magenta svart



# Lá ikki fyri at fara til Suðuroyar á fund

**– Tað er vetur og Suðuroyarfjørður er ikki altíð so tespiligur at fara um, sigur Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar Oljuvinnurá. Vónandi verður fundurin seinni, sigur Høgni Hoydal**

AVLÝSING
*Áki Bertholdsen*

Tað verða ongir fundir ímillum landsins hægstu politikarar, oljufeløgini og suðuroyingar í dag.

Tað var annars ætlanin, at tað skuldu vera tveir forvitnisligir fundir í Suðuroynni í dag. Í fyrstu atløgu skuldi almenningurin í Suðuroynni fáa høvi til at hitta teir tríggjar topp-politikararnar, Anfinn Kallsberg, Løgmann, Høgna Hoydal, Varaløgmann og Eyðun Elttør, landsstýrismann í oljumálum. Á tí fundinum skuldu suðuroyingar sum heild fáa høvi til at skifta orð við teir tríggjar um oljuvinnu í Suðuroynni, um støðuna hjá oynni sum heild og um, framtíðina hjá hesi oyggj.

Samstundis var ætlanin at Eyðun Elttør skuldi hava umboð fyri oljufeløgini suður við sær. Ætlanin var, at vinnulívið í Suðuroynni skuldi fáa høvi til at hitta oljufeløgini og at greiða teimum frá, hvat vinnan í Suðuroynni er før fyri, og annars at skifta orð um, hvussu eisini vinnulívið í Suðuroynni kundi fáa lut í oljuvinnuni.

Hesir báðir fundirnir vóru avtalaðir, tá í nevndin í Suðuroyar Oljuvinnuráði var á fundi við Landsstýrið fyrr í hesum mánaðinum.

Men tað er nú greitt, at hvørgin fundurin verður.

Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar oljuvinnuráð, sigur, at teir hava fingið at vita, at tað lá ikki fyri hjá løgmanni at koma. Avboðið kom fyrr í vikuni.

Hann sigur, at teir sóu hetta tiltakið sum eina eind og tá ið ein so týdningarmikil politikari, sum sjálvur Løgmaður, fekk forfall, er grundarlagið tikið undan fundunum báðum.

– Tí hava vit gjørt av at avlýsa fundirnar, sigur hann.



*– Vónandi ber til at hava fundin í Suðuroynni seinni, tí tað hevur stóran týdning, at hann verður, sigur Høgni Hoydal*

Og í løtuni veit hann ikki, antin fundurin verður seinni, ella um hann er avlýstur við alla.

Og hóast Viberg ikki fær dult fyri, at hann er ógvuliga vónbrotin av, at tað varð neyðugt at avlýsa fundin, hevur hann ikki stórvegis viðmerkingar.

– Eg havi ongar viðmerkingar uttan tað, at nú er vetur og Suðuroyarfjørður er kanska ikki altíð so tespiligur at fara um hesa ársins tíð.......

## Vónandi verður fundurin

Høgna Hoydal, varaløgmaður vónar ikki, at fundurin nú er avlýstur við alla.

– Eg havi mælt til, at fundurin verður kortini, tí eg haldi, at tað hevur stóran týdning at ein slíkur fundur verður í Suðuroynni, sigur Varaløgmaður.

– Á hesum fundunum hevði tað kunnað borið til at skorið út í papp, hvat virksemið skal vera í Suðuroynni. Tað hevði borið til hjá vinnulívinum at fingið at vita frá oljumálaráðharranum akkurát, hvat hann meinar við, tá ið hann sigur, at oljuvirksemið skal eisini vera í Suðuroynni. Og tað hevði borið til at fingið at vita frá oljufeløgunum sjálvum, akkurát, hvat virksemið, tey kunnu leggja í Suðuroy og hvat skal av virksemi, vinnan í Suðuroy kann taka lut í.

– Á tí almenna fundinum høvdu vit sostatt eisini sloppið undan at tosað í almennum vendingum. Ístaðin høvdu vit kunnað fortalt suðuroyingum heilt ítøkiliga, hvussu nógv, og hvat slag av virksemið, kundi verðið í Suðuroynni.

Hann heldur, at tað hevur stóran týdning fyri Suðuroynna, at fundurin verður.

– Avgerðin um oljuhavnina er fallin og tað er nú, at landsstýrismaðurin í oljumálum skal góðkenna ætlanirnar hjá oljufeløgunum.

Í hesum sambandi minnir Varaløgmaður á, at oljumálaráðharrin hevur lagt stóran dent á, at oljuvinnan skal koma øllum landinum til góðar og í tí sambandinum hevur hann beinleiðis nevnt Suðuroynna.

Á fundinum við Suðuroyingar hevði borið til at fingið ítøkiliga at vita, hvat liggur í hesum sigur Høgni Hoydal.






# Smyril Line nógv fleiri bíleggingar

**Smyril Line hevur selt 30% fleiri ferðaseðlar í ár sammett við somu tíð í fjør**

SMYRIL LINE
*Eyðun Klakstein*

Mitt í kjakinum um almenna leiklutin í Smyril Line, kann føroyska felagið fegnast um, at ferðafólkatalið verður hægri í ár, enn tað var í fjør.

– Vit hava fingið 30% fleiri ferðafólk higartil í ár sammett við somu tíð í fjør, sigur Áki Jespersen, leiðari á Ferðamannadeildini.

Í fjør var ferðafólkatalið hjá Smyril Line 68.000, og tað var eitt lítið vónbrot hjá felagnum.

Smyril Line miðjar ímóti at fáa 100.000 ferðafólk hvørt ár, tá nýggja Norrøna fer í sigling.

## Nógvir týskarar

Smyril Line hevur framgongd á øllum marknaðum. Tann føroyski marknaðurin er framvegis størstur, og síðani er tað í Týsklandi, at Smyril Line selir flest ferðaseðlar.

– Í fjør høvdu vit framgongd í Týsklandi, og hendan framgongdin heldur fram í ár. Týskarar hava eftir øllum at døma stóran hug at leita norðureftir, sigur Áki Jespersen.

Smyril Line er komið við í faldara hjá Danmarks Turistråd, og tað heldur Áki Jespersen hevur góða ávirkan á søluna. Somuleiðis er við tilfari hjá týska DER, sum førir farleiðir í øllum Europa fram.

– Vit fáa eisini bíleggingar longri suðuri í Europa, úr Fraklandi og Italia.

## Kanska metár

Áki Jespersen dugir ikki at meta um, hvussu sølan í Føroyum verður, tí føroyingar bíleggja ofta ferðir seint, men higartil hevur framgongd verið í bólkabíleggingunum.

– Fer gongdin í bíleggingunum at halda fram, verður hetta kanska besta árið hjá okkum nakrantíð, sigur Áki Jespersen.

Ferðafólkaleiðarin fegnast um framgongdin eftir heldur soltna árið í fjør, og hann sær ljóst upp á árið í ár.



*Smyril Line hevur fingið nógv fleiri bíleggingar í ár enn somu tíð í fjør*

## Tríggir tiknir fyri at koyra við kenning

Løgreglan í Havn hevur í vikuni tikið tríggjar bilførarar fyri at koyra við ávirkaðir av rúsdrekka.

Tveir bilførarar vóru tiknir hósdagin, og ein var tikin mikudagin.

Tað er ofta um vikuskiftini, at føroyska løgreglan fær hendur á bilførarum, sum hava smakkað sær á, men eftir øllum at døma eru tað eisini slíkir bilførarar at finna á vegnum mitt í viku.

## Meiri fiskur á netinum

**Webfish er nýggj heimasíða um føroyska fiskivinnu**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

Tað gerast alt fleiri føroyskar heimasíður, sum leggja seg eftir at dekka ávíst økið, og nú hevur føroyska fiskivinnan finið nýggja heimasíðu.

Tað er heimasíðan webfish.fo, sum ætlar sær at bera tíðindi úr føroysku fiskivinnuni og at vera bindilið millum føroyskar fiskimenn.

Webfish ætlar at fáa brúkararnar við í arbeiðnum á heimasíðuni. Møguleikin skal vera at lata fiskimonnum góð ráð og royndir. Eisini verður spurnarkassi, har fólk kunnu spyrja um eitthvørt innan fiskivinnu.

Webfish er í holt við at gera ein útvegarayvirlit fyri fiskivinnuna.

# Lindin sendir við minni styrki



*Fólk frá Lindini og borgarstjórin í Klaksvík settu fyri tveimum vikum síðani nýggja sendaran á Brúnaskarði til*

*Mynd: Regin Samuelsen*

**Føroya Tele hevur skrúva sendaran hjá Lindini eitt sindur fyri, eftir at Fjarskiftiseftirlitið fekk hópin av klagum úr Klaksvík**

LINDIN
*Eyðun Klakstein*

Nú sendir sendarin hjá kristiligu útvarpsrásini Lindini á Brúnaskarði í Klaksvík við minni styrki enn fyrstu vikuna.

Fólk hjá Føroya Tele vóru fyrst í hesi vikuni á Brúnaskarði og skrúvaðu niður fyri sendaranum, men enn er eingin verulig kanning gjørd av sendaranum og viðurskiftunum á Brúnaskarði.

– Vit ætla at kanna sendaran nærri fyri at vita, um nakað er galið við honum, men í fyrstu syftu hava vit skrúva hann eitt sindur niður eftir áheitan frá Fjarskiftiseftirlitinum, sigur Jens Julian Reinert, leiðari á Radiodeildini hjá Føroya Tele.

## Klagur úr Klaksvík

Lindin hevur farnu tvær vikurnar sent umvegis nýggja sendaran á Brúnaskarði.

Í fyrstu vikuni eftir at sendarin var tikin í brúk, gramdu nógv fólk í Klaksvík seg um, at sendarin órógvaði sendinetið, og Fjarskiftiseftirlitið fekk nógvar klagur.

Fjarskiftiseftirlitið hevur síðani havt samband við Lindina og Føroya Tele, sum umsitir sendinetið hjá Lindini, og ætlanin er, at Føroya Tele skal kanna sendaran og viðurskiftini á Brúnaskarði nærri fyri at fáa loyst trupulleikan.

## Samanspæl millum sendarar

– Vit kannaðu og máldu sendaran, áðrenn hann varð settur upp, og tá var alt í lagi við honum, sigur Jens Julian Reinert.

– Men vit ætla aftur á Brúnaskarð fyri gera nýggjar mátingar har. Ein trupulleiki kann verða samanspælið millum teir ymsu sendararnar, men tað skulu vit kanna, sigur hann.

Lindin, Útvarp Føroya og Rás 2 senda øll umvegis egnar sendara á Brúnaskarði.

Síðani sendarin hjá Lindini varð skrúvaður niður, eru sendiviðurskiftini í Klaksvík batnað, men summi lurtitól hava framvegis trupulleikar.

gult cyan magenta svart